Edmund Joensen, løgtingsmaður:

# Tjóðveldisflokkurin er ikki komin úr stað

**- Allir flokkar á tingi hava sum mál at vinna føroyingum ein sjálvberandi búskap. Vit halda haraftrat, at okkara fyrimunir eru ein sjálvstýrandi tjóð í einum størri ríki – og sum partur av Evropu, sigur Edmund Joensen, løgtingsmaður og løgtingsformaður, sum verður við á tiltakinum á Eiði í annaðkvøld**

FÓLKAATKVØÐAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá ið vit høvdu Edmund Joensen, løgtingsmann í telefonini í morgun, sat hann júst og fyrireikaði seg til tiltakið á Eiði í annaðkvøld, sum tjóðveldisfeløg skipa fyri.

Tiltakið verður fyriskipað í samband við, at tað í morgin eru seksti ár, síðan fólkaatkvøða var í Føroyum um loysing og samband.

- Eg fari helst at gera onkrar viðmerkingar til tað, sum Annfinnur í Skála, søgufrøðingur, fer at siga í sínum fyrilestri, og eisini fari eg at vísa á, hvussu onnur enn loysingarfólk síggja fólkaatkvøðuna fyri seksti árum síðan. Tað er nú einaferð soleiðis, at tað eru fleiri síður í eini søk – og ikki bert tann eina.

Edmund sigur, at hann fer at nema við ”pólarnar” í føroyskum politikki og vísa á, at tíðin er farin frá hesum.

– Eg haldi, at orkan kann brúkast betri og konstruktivari enn til áhaldandi kegl um loysing og samband. Allir flokkar á tingi eru fyri einum sjálvberandi búskapi í Føroyum – uttan mun til, hvat vit halda um stjórnarviðurskiftini millum londini.

Løgtingsmaðurin vísir á, at Sambandsflokkurin hevur verið til í 100 ár.

- Hesi árini er flokkurin vorðin ”moderniseraður” eftir tørvi og seinast við nýskipanaruppskotinum, sum hevur gjørt karmarnar í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark munandi greiðari.

Edmund Joensen harmast um, at Tjóðveldisflokkurin – sum hann tekur til, ikki er komin longur.

- Eg vil siga, at flokkurin ikki er komin úr stað síðan stovnanina fyri skjótt seksti árum síðan. Tiltakið á Eiði, har vent verður aftur til tað, sum hendi í 1946, er eitt tekin um hetta, heldur løgtingsmaðurin.

Hann heldur, at tað, sum vit hava rópt ”vinstra og høgra”, eisini er broytt seinastu árini.

- Í vinnulívsspurningum liggur Tjóðveldisflokkurin nú nærri Sambandsflokkinum, og í vælferðarspurningum draga at kalla allir flokkar á tingi somu línu.

Edmund Joensen sigur, at Sambandsflokkurin framvegis – og í framtíðini – verður ein sambandsflokkur, sum heldur, at vit sum samfelag hava størri og betri møguleikar sum partur av eini størri tjóð - og sum partur av Evropu.

- Vit halda, at okkara støða sum sjálvstýrandi tjóð í einum størri ríki er ein fyrimunur fyri okkara land og fólk, sigur løgtingsmaðurin, sum fer at røða á tiltakinum, ið tjóðveldisfeløg skipa fyri á Eiði í annaðkvøld.



*- Í vinnulívsspurningum liggur Tjóðveldisflokkurin nú nærri Sambandsflokkinum, og í vælferðarspurningum draga at kalla allir flokkar á tingi somu línu, sigur Edmund Joensen, løgtingsmaður*

